


*Fyrrverandi Tjaldur vejnarin, Bogdan Burcea*

# Noyddust at siga venjaran upp

**HONDBÓLTUR** **Bogdan Burcea hevur ikki verið eins uppsettur í ár, sum undanfarin ár. Tí noyddist nevndin í Tjaldri at siga hann úr starvi. Trygvi Mortensen, sum loysir hann av, ætlar sær at vinna liðið í finalurnar í steypakappingini og landskappingini**

Uni Holm Johannesen

Niels Peter Bech er nœstformaður hjá Tjaldri.

– Tað er ongantíð stuttligt at siga venjarar úr starvi. Vit mettu, at tað var rætt at siga hann úr starvi, sigur hann.

Boðini komu fríggjakvøldið.

– Hondbóltsfelagið Tjaldur og Bogdan Burcea hava í kvøld avgjørt at gevast við samstarvinum, skrivar felagið í skrivi, sent fjølmiðlunum.

Aftaná fýra ár eru Tjaldrið og Bogdan Burcea farin hvør til sítt. Hondbóltsfelagið í Runavík hevur vunnið seg úr næstbestudeildina og upp á ovasta tindin í føroyskum kvinnuhondbólti undir leiðsuni av Burcea.



*Nýggi Tjaldur vejnarin, Trygvi Mortensen*

*savnsmynd*

Niels Peter Bech sigur, at rumenski venjarin hevur ikki verið eins uppsettur í hesum kappingarárinum, og tað sæst aftur í avrikunum. Bech harmast um, at nevndin noyddist at taka hesa avgerðina.

Mikukvøldið í farnu viku spældi Tjaldrið javnt á heimavølli móti StÍF, sum er greitt botnlið.

Tjaldur hevur ikki spælt um vikuskiftið. Um avgerðin skuldi takast, so skuldi tað vera nú, sigur Niels Peter Bech. Soleiðis hevur nýggi venjarin eina viku at gera sína ávirkan galdandi.

– Vit hava snøgt sagt ikki verið nøgdir við avrikini í hesum kappingarárinum. Bogdan hevur havt sera stóra ávirkan á felagið, og vit eru sera takksamir fyri hansara arbeiði. Tað er í sátt og semju, at vit gevast við samstarvinum, hóast hann ikki ynskti tað, sigur Niels Peter Bech.

Hann leggur dent á, at eingin hevur klamsað við hurðunum.

### Trygvi er spentur

Trygvi Mortensen hevur loyst Bogdan Burcea av.

Hann hevur seinastu árini roynt seg sum fótbóltsvenjara. Eitt starv, sum gagnar honum sum hondbóltsvenjara.

– Tú arbeiðir við fólki, og kropsliga venjingin líkist nógv. So tað eru ávísir fyrimunur við tí, sigur Trygvi Mortensen, sum umframt at spælt sjálvur og verið venjari hjá hondbóltsliðnum NSÍ, hevur roynt seg sum dómara.

Hann sigur, at Tjaldur skal spæla positivan hondbólt.

– Tað ræður um at finna spæligleðina aftur skjótast tilber. Um tað eydnast, samstundis sum vit stríðast fyri tí, so koma vit langt, sigur hann.

Trygvi Mortensen ger greitt, at málið er at vinna seg í finalurnar í landskappingini og steypakappingini.

Niels Peter Bech, næstformaður, er spentur.

– Nú royna vit hetta, og so fer tíðin at vísa, um vit tóku røttu avgerðina, sigur hann.

Tjaldur spælir á heimavølli móti Neistanum komandi sunnudag.



# Kyndil fekk fult í Vági

**HONDBÓLTUR** **Uppflytararnir úr Kyndli syrgdu fyri, at VB hevur fyribils mist sambandið við ovastu liðini**

Uni Holm Johannesen

Átta ymsir málskjúttar. Og Randi Wardum skeyt flest mál fyri Kyndil við sínum fimm málum.

Tað var eitt liðavrik fram um nakað annað, sum var orsøkin til, at Kyndil vann í Vági í gjár.

Úrslitið var 23-21. Hálvleiksstøðan var 14-10 til gestirnar.

Úrslitið hevur verið við sær,at VB hevur mist sambandið við ovastu liðini. Vágskvinnur eru nummar fýra við sjey stigum, sum eru fimm færri enn oddaliðið Stjørnan.

### Vóru frammanfyri

Kyndil vann sær trygga leiðslu í fyrra hálvleiki.

VB var á odda 7-4 aftaná 14 minuttir, men so gekk illa hjá teimum.

Gestirnir vunnu 10-3 seinastu løtuna í fyrra hálvleiki.

VB royndi at svara aftur aftaná hvíldina, og tað var tætt við, at vágskvinnur fingu stig.

Í seinastu royndini sendi heimaliðið í stongina, áðrenn Kyndil fór í skjótálop, og Jórun Ludvig skoraði til 23-21.

Jónleif Sólsker stóð á odda fyri liðnum hjá Kyndli hesaferð. Geir Wardum, høvuðsvenjari, sat millum áskoðararnar, tí hann hvílir seg í nakrar vikur eftir skurðviðgerð í rygginum, skrivar heimasíðan hjá Kyndli.

*uni@sosialurin.fo*

# StÍF byrjaði alt ov illa

**HONDBÓLTUR** **StÍF fekk sítt fyrsta mál í Vestmanna, tá 15 minuttir vóru spældir. Tá var VÍF framman fyri 7-1, og gestirnir høvdu lítlan møguleika at vinna leiðsluna aftur**

Uni Holm Johannesen

Við óvæntaða javnleikinum á útivølli móti Tjaldrinum í skjáttuni, varð væntað, at botnliðið StÍF fór helst at standa VÍF kurl í Vestmanna í gjár.

Tær gjørdu tær ikki. Og tað langt frá.

VÍF, sum er næstniðast, vann 25-16. Hálvleiksstøðan var 13-7.

Kvinnurnar úr Vestmanna vunnu sær eina trygga leiðslu beinanvegin, og so var mótbrekkan tung hjá StÍF.

VÍF hevur nú fýra stig, sum eru vunnin móti StÍF.

Liljan Djurhuus og Torgunn Johansen vóru toppskjúttar hjá VÍF við fimm málum.

Rebekka Justinussen, StÍF, var toppskjútti við seks málum.